**Sjálvsognarstovnurin ALV**

# ALV søkir eftir fólkum til eindina »Avlamisvirksemi«

**Søkt verður eftir fólkum at starvast umleið 10 tímar um vikuna**

Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum at geva avlamisfólki eina innhaldsríkari og stimbrandi tilveru, við at koma saman við øðrum til virksemi og hugna. Og læra tey eitt nú handverk og list.

Vanliga verður arbeitt tveir dagar um vikuna í tímunum 17.00 til 21.00.

**Førleikakrøv**

1. Viðkomandi útbúgving og/ella royndir. T.d. ítrivsfólk, fólk ið kunnu geva umsorgan og hugna, so sum smíðlærari, hondarbeiðslærari, pedagogur, terapeutur, teldukønur, málari ella líknandi
2. Evnir at samansjóða, vera um og læra av tær avlamispensjónistar
3. Ert hugskotsfullur, kreativur og positivur
4. Evnir at samstarva

**Vit bjóða**

- Spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru at ávirka tilboðið

**Løn og setanartreytir**

- Starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið
- Størvini verða at seta uml. 1. mai 2003, ella skjótast tilber

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Guðrun Guðjónsson, deildarleiðara á tlf. 350072 ella tlf. 253200

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. mars 2003.**
Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerði 6, kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

brævbjálvin skal viðmerkjast:
**»umsókn avlamisvirksemi«**

***»Avlamisvirksemi«***
*Ætlað avlamisfólki, ið hava fingið tillutað miðal ella hægstu pensjón, hava tørv á at koma saman við øðrum, og kunnu virka eitthvørt lætt ítriv, sum møguliga kann seljast*

*Endamálið við eindini er at geva arbeiðstarnaðum fólki møguleika at fáa ein meira innihaldsríkan og stimbrandi dagligdag. Og soleiðis eisini fyribyrgja einsemi og dapurskygni hjá avlamisfólki.*

Sosialurin
-tað loysir seg

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Skeið fyri handverkarar – álegging av takpappi

Í samstarv við ICOPAL verður skeið **í viku 12** í álegging av takpappi

**Innihald:**
- Skering
- Inndekning
- Sveising

**Skeiðleiðari:** Poul Gentz frá J. Icopal
**Kostnaður:** 1.750,00 kr. íroknað frálæru og mat
**Tilmelding:** **áðrenn 4. mars 2003**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir regluger um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Yrkisdpeilin og Vitan fáast frá Skeiðsdeplinum.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur dt@hsh.fo

# Ársaðalfundur Róðrarsamband Føroya

Við hesum verður sagt frá, at ársaðalfundur Róðrarsambandsins verður í ÍSF-húsinum leygardagin 28. mars 2003 kl. 10.00.

Fundarskrá sambært grein 4 í lógunum fyri Róðrarsamband Føroya.

Uppskot um lóg og lógarbroyting skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi fjúrtan dagar fyri aðalfundin.

**Róðrarsamband Føroya**

# Dagrøktari

## til Sjóvar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktara at arbeiða fulla tíð frá 1. mars 2003 til 1. august 2003.

Umsóknir skulu vera dagrøktarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 28. febr.

**Sjóvar Kommuna**
490 Strendur

# Last- og kranavognskoyring

***Koyrt verður um alt meginlandið***
***Við kranavogni upp til 5 t.***
***3 við vippu***

**Henning Thomsen (y)**
**Grótlaðari** Tlf. 316739 - 283639

**vit flyta fyri virkir, stovnar og privat**

FAROE TRANS
Vøruflutningur
50 69 69
e-mail: faroetrans@email.com

***Ring og fá eitt gott tilboð***

# Varaleiðari

Søkt verður eftir varaleiðara til ein stovn við 30 børnum í aldrinum 3-7 ár. Starvið er 30 tímar um vikuna á einari stovu við 15 børnum. Ætlandi verður starvið sett 01. apríl 2003.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Starvið er lønt á lønarstigi 10-15.

Nærri upplýsingar um starvið og stovnin fáast við at venda sær til leiðaran.

Umsókn saman við avritum av prógvi og viðmælum verður at senda stovninum í seinasta lagi mánadagin 10. mars 2003.

**Barnagarðurin Vípan,**
Vípuvegur 3,
100 Tórshavn.
Tlf. 31 75 35

# AUTO

-Dag & nátt-

-Alt døgnið-

Vilt tú bil hýra - ring 311234

Nú fáast eisini Talutíðarkort

BENZIN
DIESEL
KIOSK

Føroya Tele Kall



AUTO
311234






Vegna økt virksemi, søkir Hotel Føroyar eftir náttarvørði til móttøkuna at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til móttøkuleiðaran.

Starvið umfatar ma. eina professionella kundatænastu, inn- og útskriving av gestum, telefonavgreiðsla, søla av kioskvørum, aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**
- Er álítandi og fyrikomandi
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur kunnleika til enskt og KT

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Unn Hilduberg, móttøkuleiðari á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 10. mars 2003

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870




Glasstovan søkir eftir einum tænaralærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir, har lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum lærupláss. Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Peter Hentze á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. mars 2003

★★★★ GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870

# Gáski bátar

Mótún (longd 9,05, breidd 2,40)



Línuspæl og Beitir egningartrakt + 20 stokkar

Prísur kr. **368.000,-** u/mvg

Sjálvstýrari, ekkolodd, GPS, Gummibátur, nýrenoveraðan motor, nýtt drev.
Kann leverast beinanvegin

3. føroyskar oljutrykk snellur til sølu (síggja gott út)
3. svenskar el-snellur til sølu (eftirhugdar)

Eisini eru aðrir bátar í Íslandi: Mótún, Gáski 800, Gáski 1000

Við í øllum prísum, er ein ferðaseðil til Íslands at hyggja/royna bátarnar.

10 mannafar, sera væl riggað, við fiskiloyvi, og í fyrstafloks standi, til sølu

**TLF. 227830 • leygardag og sunnudag gjarna um kvøldið**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2809, P/F Vágatunnilin, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 29.01.2003.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 20.000.000,00 til kr. 120.300.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 20.000.000,00 til kurs 100.

*Skráseting Føroya tann 20. februar 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2543, Sp/f Maskot, 650 Toftir.

**Viðtøkur broyttar:** 18.01.2003.
**Nýtt navn:** P/F Maskot
**Kapitalur:** Hækking við kr. 913.000,00 til kr. 996.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 913.000,00 við grunshækking.

*Skráseting Føroya tann 20. februar 2003*

*Kristin Balle*

# Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluuppgávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir planlegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú sjálvandi eisini vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk, fíggjarleiðara, á tlf. 311820. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jakup@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 25. februar, og skal umstóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.